# AaB plástur á sárið

Hóast tað ikki eydnaðist danska meistarafelagnum AaB at koma í fjórðingsfinaluna í UEFA Cup-kappingini, hevur felagið fingið eitt fíggjarligt plástur á sárið. Champions League-fótbólturin bjargar roknskapinum fyri 2008, so hann hevur eitt yvirskot upp á 36,7 milliónir krónur, fyri skatt. Í felagnum spæla tey eisini hondbólt, íshocky og annað, men tað er fótbóltsdeildin, sum gevur fíggjarligan vinning og heldur restini uppi.



# Tey átta í UEFA Cup

Eftir at áttandapartsfinalurnar í UEFA Cup-kappingini nú eru spældar, eru hesi lið klár til fjórðingsfinalurnar: Werder Bremen, Marseille, Dynamo Kiev, Shaktar Donetsk, Hamburger SV, Udinese, Paris Saint Germain og Manchester City. Lutakastið um, hvørji av hesum møtast, var klokkan eitt seinnapartin, men tá var blaðið longu farið til prentingar.



*Ovurfegnu spælararnir hjá Manchester City fagna málverjanum Shay Given, sum søkti AaB, tá hann tók tvey av spørkunum í brotssparkskappingini*

*Mynd: Claus Fisker/Scanpix*

# AaB kann iðra seg

**Norðurjútska liðið hevði millióningarnar úr Manchester á knøunum, men hevði ikki neyðuga neyvleikan í brotssparkskappingini**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

AaB-spælararnir og viðhaldsfólk teirra kunnu lyfta høvdið høgt. Í samfullar 120 minuttir stríddust teir mannliga, og síðst í vanligu leiktíðini høvdu teir liðið úr Manchester á knøunum. Tað rakk til heiður og æru, men tað rakk ikki til fjórðingsfinalurnar í UEFA Cup-kappingini.

Fyri aðru ferð í hesi kappingini slapp Manchester City úr Danmark við skinninum á nøsini. Áðrenn bólkaspælið vunnu teir á FC Midtjylland eftir brotssparkskapping, og nú hava teir vunnið á AaB, somuleiðis eftir brotssparkskapping.

Tað var ikki so nógvur dramatikkur í byrjanini av dystinum. Bæði lið hóttu hendinga ferð málið hjá mótstøðuliðnum, og hevði Stephen Ireland ein góðan møguleika at leggja City á odda.

## AaB longur fram

Vitandi, at tvey mál skuldu til fyri bara at fáa umdyst, fór AaB longur fram á vøllin í seinna hálvleiki. Caca hevði ein stóran møguleika í byrjanini av seinna hálvleiki, sum fór beint við síðuna av, og Andreas Johansson var feldur í brotsteiginum, men franski dómarin metti ikki, at talan var um brotsspark.

AaB helt fram við at trýsta fyri at fáa hol á, men tá átta minuttir vóru eftir av vanligu leiktíðini, kundi Robinho havt avgjørt alt fyri City, men skotið rakti tvørtræið.

Tá fimm minuttir vóru eftir av vanligu leiktíðini, broyttist alt. Caca spældi bóltin stutt til Luton Shelton, sum setti bóltin í netið við handaru stong. Nú byrjaði teir í AaB at tevja møguleikan, og teir trýstu enn meira. Og tá 90 minuttir vóru farnir fingu brotsspark. Michael Jacobsen skoraði trygt, og nú var støðan 2-0 til AaB.

## City kaldari

Tá Manchester City hevði vunnið 2-0 í fyrra dystinum, var neyðugt við longdari leiktíð. AaB helt fram við at trýsta, men mál kom einki, og neyðugt var tí við brotssparkskapping.

Í brotssparkskappingini vóru marginalarnir við Manchester City. Hóast AaB-málverjin fór rætta vegin tríggjar ferðir, so tók hann einki av spørkunum.

Verri gekst hjá Luton Shelton og Thomas Augustinussen, sum skuldu finta roynda liðfelagan hjá Gunnari Nielsen, Shay Given. Given tók brotsspørkini hjá teimum, og endin var, at City vann brotssparkskappingina 4-3.

## Hug at gráta

AaB-spælararnir fylgdu taktikkinum, sum var lagður, og var tað ein ógvuliga vónsvikin høvuðsvenjari, sum tosaði danskar fjølmiðlar eftir dystin.

– Tað er líka við, at eg fari at gráta, segði Magnus Pehrsson við donsku fjølmiðlafólkini. Hann rósti sínum spælarum fyri at leggja eitt maksimalt trýst á Manchester City síðstu 20 minuttirnar av dystinum, tá AaB hevði City á knøunum.

Venjarin hjá Manchester City, sum í UEFA Cup-kappingini hevur møtt trimum donskum liðum í ár, hevði bara rós til AaB: – Teir eru komnir langt í hesi kappingini í ár og hava lært eina rúgvu. Tað fingu vit at kenna í kvøld, segði Mark Hughes.

# Fýra mans í álop hvørja ferð

**– Eg havi ikki havt svøvnleysar nætur eftir úttøkuna, tí hetta er vegurin, vit eiga at ganga, sigur Heðin Askham, sum undan dystinum ímóti Íslandi sunnudagin hevur fingið nakrar ákoyringar fyri at taka út eitt so ungt landslið.**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Við flogfarinum til Íslands fyrrapartin var A-landsliðið í fótbólti, sum seinnapartin sunnudagin skal spæla ímóti Íslandi í Kórinn-høllini á Kópavogi. Stundir og høvi hava ikki verið at samlað menninar undan fráferðini, men tvær venjingar verða yviri í Íslandi áðrenn dystin, ein í kvøld og ein í morgin.

– Vit ætla okkum at leggja stóran dent á at vera vælskipaðir á vøllinum. Og tá vit fara í álop, skulu vit helst hava fýra mans við fram hvørja ferð, og eg vil fegin hava, at síðurnar koma væl við, umframt at miðvøllurin skal stuðla álopinum, sigur Heðin Askham, sum saman við Jens Martin Knudsen hevur ábyrgdina av landsliðnum henda eina dystin.

Talan er um ein hin yngsta og minst roynda A-landshópin, Føroyar nakrantíð hava havt til ein dyst, og tað hevur Heðin eisini fingið at hoyrt fyri. Hann hevur tó ikki tikið sær hetta nær, men fer fúsur og bjartskygdur í gongd við uppgávuna.

– Eg havi ikki havt svøvnleysar nætur eftir úttøkuna, tí hetta er vegurin, vit eiga at ganga. Um tað so skal gerast upp á henda mátan ella ikki, má tíðin sleppa at vísa. Onkur hevur eisini sagt tað soleiðis, at talent vinnur dystir, men rutina vinnur kappingar, sigur Heðin Askham.

## Eisini ungt lið

Eisini íslendski starvsbróður hansara, Ólafur Jóhannesson, hevur tikið út eina unga manning til dystin sunnudagin, tí av teimum 16 úttiknu eru fimm spælarar, sum eiga fyrsta landsdystin til góðar, og fýra hava bara spælt ein. Aron Einar Gunnarsson, sum spælir við AZ Alkmaar í Hollandi, er einasti útisetin á íslendska liðnum.

Tá Ísland og Føroyar spældu vinardyst fyri einum ári síðani, sum var fyrsti innandura fótbóltslandsdystur har yviri, vann Ísland framman fyri 747 áskoðarum 3-0, eftir at hava verið á odda 2-0 í hálvleikinum.

Dysturin sunnudagin byrjar klokkan 14.00, og umvegis íslendska ríkissjónvarpið RÚV verður hann vístur í sjónvarpinum hjá Kringvarpinum.



*Kórinn-høllin á Kópavogi verður seinnapartin sunnudagin karmur um vinardystin millum fótbóltslandsliðini hjá Íslandi og Føroyum*